## Kæra ikki deyðadómin

Teir báðir norðmenninir, sum eru dømdir til deyða fyri dráp og onnur brotsverk í Demokratiska Lýðveldinum Kongo, hava valt at taka við dóminum. Teirra vón er nú, at myndugleikarnir í Kongo eru sinnaðir at lata teir sleppa til Noregs, so teir kunnu fáa fongsulsrevsing har ístaðin fyri. Norska uttanríkisráðið er uppi í málinum, og ein norskur sakførari er í Kongo og kannar umstøðurnar. Tjostolv Moland og Joshua French vórðu dømdir til deyða fyri at hava myrt ein bilførara. Teir vórðu eisini dømdir fyri njósning og vápnað rán.



## Tøma flóttafólkalegu

Franska løgreglan fór í morgun undir at tøma eina umstrídda flóttafólkalegu uttan fyri býin Calais við Ermasund. Í leguni eru umleið 1.500 fólk, sum eru komin ólógliga til Fraklands. Fronsku myndugleikarnir siga, at tey flestu flóttafólkini vilja sleppa til Bretlands, og ES-myndugleikarnir hava mælt Bretlandi til at taka ímóti nøkrum teirra. Men bretski innanríkisráðharrin, Alan Johnson, sigur, at sambært reglunum skulu tey søkja um uppihaldsloyvi í tí landi, sum tey eru í, og tað er í hesum førinum Frakland og ikki Bretland, sigur hann. Meginparturin av flóttafólkunum eru úr Afghanistan, skrivar Reuters.



*- Uppskotið hjá Sambandsflokkinum um at hækka blokkin, bara forstýrar samgonguna, sigur Anfinn Kallsberg*

# Anfinn Kallsberg skilir ikki Sambandsflokkin

**Nú má Sambandsflokkurin blíva samdur við seg sjálvan um, hvat hann vil, sigur formaðurin í fíggjarnevndini hjá Løgtinginum**

RÍKISVEITING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta bara forstýrar samgonguna.

Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, er ikki fegin um nýggja uppskotið frá Sambandsflokkinum um at hækka blokkin í Danmark.

- Tað segði hann í tíðindunum á Rás2 nú á miðdegi.

Tað hevur vakt ans í samgonguni, at flokkurin nú hevur skotið upp at biðja danir um hægri blokk fyri at bøta um undirskotið á fíggjarlógini.

Men tað vakti uppaftur størri ans og undran, tá ið Edmund Joensen, tingmaður fyri Sambandsflokkin, í sjálvdrátti sendi út tíðindaskriv um tað sama, sum um at hann hevði funnið upp á hetta sjálvur.

### Vánaligt hugskot

Men í tíðindunum á Rás2 á miðdegi í dag, helt Anfinn Kallsberg, at hetta er eitt vánaligt hugskot.

- Tvørtur ímóti, tí vit settu skipanini úr gildi fyrst í øldini, har blokkurin verður prístalsviðgjørdur, so at hann hækkar í takt við prísvøksturin í samfelagnum.

- Endamálið við tí var, at sum frálíður skuldi blokkurin fáa minni og minni týdning í føroyska búskapinum.

Anfinn Kallberg leggur afturat, at hendan ABC samgongan hevur gjørt ta søguligu semju í samgonguskjalinum, at blokkurin skal minka í takt við at búskapurin veksur.

- Tað er ein fín loysn, sum allir flokkar á tingi átti at tikið undir við og tað átti at verið samlaði føroyski politikkurin mótvegis dønum, segði fyrrverandi fólkafloksformaðurin við Rás2.

Hann segði at fyri Fólkaflokkin er tað umráðandi at fáa ein sjálvberandi, føroyskan búskap sum byggir á tey virði, sum samfelagið sjálvt skapar.

- Vit eiga heldur at laga útreiðslurnar til tær inntøkur, samfelagið skapar og tí er tað forstýrandi, at Sambandsflokkurin nú uppfinnur nýggjar inntøkur, sum gevur loyvi til, at útreiðslurnar kunnu veksa enn meir, uttan at tað hevur grundarlag í framleiðslu, samfelagið sjálvt skapar.

### Skilir ikki Sambandið

Anfinn Kallsberg staðfestir, at samgonguskjalið er púra greitt og tí skilir hann ikki Sambandsflokkin.

Hann helt, at Sambandsflokkurin átti at blivið samdur við seg sjálvan, tí sum hann skilti løgmann, tekur hann ikki undir við ætlanini.

Men hann hevur illgruna um, at hetta er bara fyri at gera vart við seg.

- Orsøkin kann vera, at ES málið, sum er hitt stóra rumbulsmálið hjá Sambandsflokkinum, nú er fánað burtur, eftir at veljarakanningar í íslandi, vísa, at støðan er broytt.

- So møguliga er tað hetta bara fyri at gera vart við seg, leggur Anfinn Kallsberg afturat.

# Thomas Eje til Føroya

**18. desember verður ein stór jólakonsert í Høllini á Hálsi við Thomas Eje, Lene Siel og ensku Blake. Five Star Entertainment, sum áður hevur staðið fyri stórum konsertum, skipar nú fyri jólashow við Thomas Eje, Lene Siel og ensku Blake**

UNDIRHALD
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Jólashowið verður í Høllini á Hálsi fríggjakvøldið 18. desember.

Thomas Eje er stutt sagt eitt multitalent. Tey flestu kenna hann frá Linje 3 og Thomas Eje Show, og tað verður eisini í hesum stílinum, at Thomas Eje fer á pall í Høllini á Hálsi.

Lene Siel er ein av teimum stóru donsku sangarinnunum og telist eisini millum mest seljandi kunstnarar í Danmark, bæði tá umræður fløgur og atgongumerkir til konsertir. Jólakonsertir við Lene Siel er í donskum konsertsalum og kirkjum ein týðandi partur, tá tann serligi jólahugnin skal skapast.

Blake er eitt av teimum nýggju bretsku boybandunum. Blake vann í 2008 The Year Award at the Classical BRIT's. Og tá teir við sínari blanding av klassiskum tónleiki og poppi struku til topps á ensku hitlistunum, gjørdist teir skjótt fólkaogn. Sangurin "Swing Lowe" varð eisini valdur sum almenni slagsangurin hjá enska rugby-landsliðinum til HM í rugby í ár.

Saman við Thomas Eje, Lene Siel og Blake fer eitt 7 manna stórt orkestur, undir leiðslu av kapelmeistara Elo "Luffe" Lindhardsen, atstanda fyri undirhaldinum á jólashowinum hjá Five Star.

